Fróðskaparsetur Føroya
University of the Faroe Islands

Føroyamálsdeildin
Department of Language and Literature

# Skeiðslýsing — Heystið 2018
## *Course description*

**Skeiðsnummar** *Course number*: 1455.18

**ECTS** *ECTS*: 10

**Ábyrgd** *Contact*: Jógvan í Lon Jacobsen

| | |
|---|---|
| **Stig**<br>*Level* | MA |
| **Heiti**<br>*Title* | Purisma (MA) |
| **Endamál**<br>*Aim* | Endamálið við skeiðinum er at kanna føroyska purismu í norðurlendskum samanhangi. Tað merkir, at tey lesandi bæði skulu fáa innlit í føroyska og norðurlendska purismu. Hetta samanberandi háttalagið skal geva teimum lesandi møguleika fyri at síggja líkleikar og munir millum tey norðurlendsku málsamfeløgini, tá ið tað snýr seg um purismu bæði søguliga og samtíðarliga. |
| **Innihald**<br>*Content* | Innihaldið í skeiðinum kann býtast sundur í tveir partar: Ein søguligan part, har ið føroysk purisma verður samanborin við norðurlendska purismu, og ein part, sum viðger purismuna samtíðarliga. Í tí fyrra partinum verður purisman viðgjørd úr søguligum samanberandi sjónarhorni, og í seinna partinum verður purisman viðgjørd úr einum samtíðarligum sjónarhorni. Tann samtíðarligi parturin snýr seg mest um føroyska purismu, t.d. úr samfelagsmálvísindaligum sjónarhorni. |
| **Læru- og undirvísingarhættir**<br>*Learning and teaching approaches* | Undirvíst verður tríggjar tímar um vikuna heysthálvuna 2018. Undirvísingin verður skipað sum lærarframløgur og framløgur hjá teimum lesandi. |
| **Próvtøkuháttur**<br>*Assessment method* | Skrivlig próvtøka í 6 tímar. Til próvtøkuna er loyvt at hava alt tilfar við frá undirvísingini umframt orðabøkur. |
| **Lestrarlisti**<br>*Literature* | Lestrarlisti verður útflýggjaður við skeiðsbyrjan. |
| **Læruúrtøka** | Tá ið skeiðið er lokið, hevur tann lesandi: |

| | |
|---|---|
| *Learning outcomes* | • Fingið góðan førleika til at meta um purismu sum søguligt og samtíðarligt fyribrigdi í Norðurlondum, serliga Føroyum<br>• Fingið innlit í líkleikar og munir millum føroyska purismu og purismu í øðrum Norðurlondum<br>• Fingið innlit í, hví summi málsamfeløg eru puristiskari enn onnur.<br>• Fingið førleika til at meta um háttaløg í sambandi við purismugransking. |
| **Fortreytir**<br>*Prerequisites* | Studenturin skal hava staðið BA í føroyskum ella samsvarandi. Til ber eisini at taka skeiðið sum stakskeið við øðrum fortreytum (víst verður til galdandi námsskipan). |
| **Próvdøming**<br>*Examination* | Uttanhýsis. |
| **Próvtalastigi**<br>*Marking scale* | Galdandi próvtalastigi. |